Fíggjarmálastýrið
LØNARDEILDIN

# Barnsburðar-avloysari fyri skrivstovufólk

Søkt verður eftir barnsburðaravloysara fyri skrivstovufólk at byrja 2. januar 2001 og í øllum førum til 1. juli 2001

Arbeiðsuppgávur
- Avgreiða fyrispurningar um lønar- og setanarviðurskifti
- Málsviðgerð
- Fyrireika sáttmálasamráðingar
- Luttaka í samráðingum
- Skriva fundafrásagnir
- Gera reglur, vegleiðingar og mannagongdir
- Journalisering

Førleikakrøv
Vit hava hugsað okkum, at tú hevur royndir í skrivstovuyrkinum og hevur góðan kunnleika til edv.

Tú skalt eisini duga væl føroyskt og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Vit bjóða
Starv, sum gevur tær góðan førleika og innlit í lønar- og starvsfólkaviðurskifti og er sera áhugavert við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir.

Eisini fært tú høvi til at nema kunnleika til journalisering í Doculive, heimasíðuumsiting og intraneti.

- Sjálvstøðugt starv
- Flex-tíð
- Skeið og eftirútbúgvingar-møguleikar

Lønar- og setanarviðurskifti
Lønar- og setanarviðurskifti eru eftir sáttmálanum við Starvsmannafelagið og lønt í 12. lønarflokki

Viðmerkjast skal, at setanin umfatar Fíggjarmálastýrið og stovnar undir tí.

Umsókn
Umsókn við prógvum og møguligum viðmælum skal verða send

***Fíggjarmálastýrinum***
***Lønardeildini***
***Postboks 2039***
***165 Argir***

Vit skulu hava móttikið umsóknina í seinasta lagi 11. desember 2000

Vilt tú hava meiri at vita um starvið, kanst tú ringja til Karin Joensen ella Elin M. Zachariasen, á tlf. 35 20 22.

Dimmalætting tlf. 31 1212

# *Hjartans tøkk!!!*

***Stóra, stóra tøkk vil eg bera øllum tykkum, sum stuðlaðu og tóku so dyggiliga undir við mær og mínum sjónarmiðum á býráðsvalinum týsdagin 21. november, at eg varð valdur í Tórshavnar býráð við flest persónligum atkvøðum!***

At heilar **630** atkvøður skuldu falla í mín lut, er langt oman fyri alt tað, eg kundi droymt um. Eina hjartans tøkk skulu tit **591** í Havn, tit **26** á Argjum, tit **11** í Kollafirði og tit **2** í Kaldbak eiga fyri holla stuðulin!

Somuleiðis vil eg nýta høvið til at takka øllum tykkum, eg havi tosað við og heilsa uppá. Hjartans tøkk, øll tit, sum hava ringt, sent heilsanir og blómur. Tað fløvar, at tit eru so mong, ið taka undir við tí, eg havi lagt fram og ynski at fremja í verki komandi fýra árini.

Eisini vil eg takka øllum tykkum, sum á annan hátt tóku undir við okkum, sum vóru uppstillað fyri Sambandsflokkin, sum sostatt fekk **ikki færri enn fýra umboð í býráðið!**

Uttan tykkara stuðul hevði Sambandsflokkurin ikki staðið so sterkur í býráðnum, sum hann nú ger. Næstu fýra árini skulu vísa, at tykkara atkvøður **ikki fóru til spillis**, men beinleiðis eru við til at **nøra um og byggja upp** Tórshavnar kommunu hetta fyrsta skeiðið í nýggju øldini!

***Vinarliga*** *Heðin Mortensen*


# Sig okkum frá

Hendir okkurt, sum er áhugvert hjá øðrum at vita, eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20. Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07. Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Tíðindablaðið sosialurin

tvis
DYGDAR KØKAR

Við framkomnari telduútgerð tekna vit júst TYGARA køk so hann er ein mynd av veruliga køkinum

pf.KLEMENT PETERSEN
Høgaból • 600 Saltangará • Tel. 44 75 60 • Fax 44 84 60

Sosialurin - 311820



**Reyði krossur Føroya**

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánad., mikud. og fríggjad. frá kl. 19⁰⁰ til 21⁰⁰

☎ 212380



# Vikuskifti

Nr. 228 • leygardagur • 25. november 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

**Harry Potter á føroyskum**

sí›a 20-21


**JÓLAMARKNA‹UR. Hesa ársins tí› koma fleiri bøkur. Og gott er ta›. Sunnudagin n‡tti H.N.Jacobsens bókahandil høvi at s‡na fram í Útvarpshøllini og í morgin er føroysk bókaframs‡ning í Keypmannahavn**



*Forma›urin í Rithøvundafelagnum, Gunnar Hoydal á Bókadagstiltakinum í Útvarpshøllini sunnudagin*

# Bókadagar

*Birgir Kruse*

Sunnudagin skipa›i Rithøvundafelag Føroya fyri bókadagshaldi í Útvarpshøllini í Sortudíki í Havn. Finnur Hansen bey› vælkomin vi› fjálgum klavertónleiki, hendan ilf‡sna dag har parkeringsvi›urskiftini vóru so út av lagi. Útvarpshøllini er frálík til sovori› tiltak. Ljós og ljómandi.

Ikki færri en 9 rithøvundar løgdu fram og lósu úr n‡ggju verkum teirra. Kanska er ein teirra bók nummar f‡ratúsund. Tí so nógvar eru nú komnar á føroyskum. Á Landsbókasavninum telja tey hvønn dag, seg›i forma›ur Rithøvundafelagsins.

Fyrstur var Anfinnur í Skála, sum læs eitt brot úr fyrstu bókini í forvitnisligu rø›ini ”Heimurin forni”. Saman vi› barnabók hjá Maud Heinesen, er hetta einasta upprunaføroyska skaldsøgan í ár. Eitt ævint‡r, har høvundurin letur upp fyri einum fjaldum heimi og skapar sítt egna, gandakenda mál. Hetta fyrra bindi› í rø›ini eitur ”Hjá dvørgunum í Ni›afjøllum”. Seinna bindi›, sum enn ikki er komi›, nevnist ”Fer›in til Zambora”.

Annar rithøvundurin, i› leg›i fram var Bár›ur Jákupsson, sum hevur skriva› ”Myndlist í Føroyum”. Hetta er snotulig bók, i› l‡sir føroysku myndlistasøguna upp til ídag. Tó, rithøvundurin vísti á, at hetta var bara eitt bo› um føroyska myndlist. Hansara egna og subjektiva bo›. Vónandi gongur ikki so long tí› til hin næsta bókin um føroysku myndlistasøguna kemur, helt hann fyri. Hin sí›sta kom í 1983. Sum áhoyrari haldi eg ikki, at høvundurin hevur orsøk at smæ›ast, ella ver›a lítilátin. Hetta er eitt hent verk, sum eg longu fleiri hevur havi havt frægd av. Hava vit Lærarabókina, Rithøvundabókina og hesa listabókina vi› hondina, so ber til at finna altskyns uppl‡singar um nútí›ar føroysk mentafólk. Eitt frálíkt ambo›. Í hesum teldutí›um kundi hugsast, at allir hesir persónsuppl‡singar í stø›ugt dagførdum líki vór›u lagdir út á neti›. Eitt alment føroyskt mentanet. Livst so spyrst. Tøknin er í hvussu er har.

Forlagi› Sprotin, sum eftir stuttari tí› hevur givi› út hópin av bókum, hevur sta›i› fyri útgávuni av hesum bá›um fyrstu verkunum.

Tri›i rithøvundur á bókadegnum var Oddfrí›ur M. Rasmussen sum fyrr í ár fekk bókmentavir›isløn M. A. Jacobsens fyri yrkingasvani› ”Rás/Sár”, i› Mentunargrunnur Studentafelagsins gav út. Oddfrí›ur greiddi frá og læs hugtakandi yrkingina, sum tekur stø›i í Letirímuni ”Mánadag havi eg einki at ger” og so framvegis.

Jógvan Arge er ivaleyst virknasti høvdundur, tá umræ›ur si›søguligar bøkur. Hann greiddi frá og læs brot úr fimta bindinum í rø›ini um føroyingar í Grønlandi ”Teir tóku land”. Jógvan vi›merkti, at í hvussu er ein, kanska tvær, koma afturat í hesari rø›ini.

Steinbjørn B. Jacobsen skriva›i fyrst í sjeytiárunum leikin ”Skipi›”, sum gekk fyri fullum húsum í Sjónleikarhúsinum. Hann greiddi frá, at hann alla tí›ina hev›i ætlan um fleiri sjónleikir, men ikki fyrr enn nú lá fyri. Evni er søguligi Nólsoyar Páll. Ein tí›arrøtt mynd, helt høvundurin.

Axel Tórgar› hevur aftur megna› at t‡›a eina av heimsins stóru bókum, ta› er leikurin ”Macbeth” hjá Shakespeare. Sonur hansara, sjónleikarin Hans Tórgar› læs og lat heilsa frá t‡›aranum. Sti›in er forlagi› sum gevur henda klassikara út.

Maud Heinesen var einasta kvinna sum var vi› á bókadagstiltakinum hjá Rithøvundafelagnum. Hon hevur í ár givi› út upprunasøguna ”Í vøggustovu vi› Helenu”. Saman vi› søguni hjá Anfinni í Skála er hetta einasta upprunaføroyska søga í ár. Sermerkt vi› hesi søgu hjá Maud er, at navni› Ahmed kemur fyri. Leikur fer fram í vøggustovu í Danmark, har ommudóttur høvundans er. Maud greiddi frá, at bókin tekur stø›i í brævasambandi teirra millum. Ein hugvekjandi fløvi, at fremmand nøvn, sum anda fremmanda mentan og fremmanda lívsásko›an hava funni› sær veg innar í føroyskar bøkur. Hugvekjandi.

Erling Poulsen tók sí›ani or›i› og greiddi frá um ta› yvirnáttúrliga. Torkil Beder eigur onkra einstaka av søgunum í n‡ggja savni hansara ”Meiri millum himmal og jør›”, men í høvu›sheitum hevur Erling sjálvur savna› og skriva›. Tann broyting er gjørd frá fyrri bókini ”Mangt er millum himmal og jør›”, at her eru heimildarfólkini nevnd. Aloftast í hvussu er. Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givi› bá›ar bøkurnar út.

Sí›sti høvundurin, sum legi› fram á bókatinginum í Útvarpshøllini var Palli Gregoriussen, arkitektur. Eftir at forma›ur Rithøvundafelagsins, Gunnar Hoydal, stutt hevi› greitt frá um vi›urskifti hjá arkitektum, tók Palli or›i› og læs brot úr ”Tórshavn vár mi›stø›a og borg 2”. Í hesi bók eru tekningar í litum, sum vísa gomlu havnina og grei›a frá húsa- og sta›arnøvnum.

Í Útvarpshøllini hev›i H. N. Jacobsens Bókahandil sett fram bøkur sum eru komnar í ár og til bar at keypa. Eitt frálíkt tiltak.

Sunnudagin ímorgin ver›ur skipa› fyri líknandi tiltaki í Føroyahúsunum á Vesturbrúgv í Keypmannahavn. Bókmentunarliga evni› er kn‡tt at teimum bá›um Jørgen-Frantz Jacobsen og Christian Matras, sum bá›ar høvdu havt stórar rundar dagar í næstum, høvdu teir liva›.

Mikudagurin er hundra› ára dagur Jørgen-Frantz Jacobsens, sum sæst í greinum eftir Jógvan Isaksen og Nils Malmros í bla›num ídag. Hósdagurin í næstu viku er hundra› ára dagurin hjá Christiani Matras. Í hesum sambandi fer He›in M. Klein, settur lei›ari á Skúlabókagrunninum at hei›ra skaldinum her í bla›num næsta vikuskifti.

Á bókadagstiltakinum í Keypmannahavn í morgin fer Ann Kari Skar›hamar at halda fyrilestur. A›rir fyrilestrahaldarar ver›a Jógvan Isaksen, Hanus Kamban og Kirsten Brix. Harumframt ver›ur sjónleikaraupplestur og anna› mangt í hugnaligu Føroyahúsunum, har sum nevnt Jørgen-Frantz Jacobsen og Christian Matras ver›a evni›.

Eisini ver›a allar tær føroysku bøkurnar, sum eru komnar í ár, s‡ndar fram. Flest øll føroysk forløg hava lati› Føroyahúsinum í Keypmannahavn ókeypis eintøk til bókadagstiltaki›.